

# Kim Dae-jung deyður

Fyrrverandi suðurkoreanski forsetin Kim Dae-jung er deyður eftir at hava ligið á sjúkrahúsi teir seinastu mánaðirnar við lungnabruna. Hann bleiv 85 ár. Kim Dae-jung verður roknaður sum ein av undangongumonnunum fyri demokratii í Asia. Í seksti- og sjeytiárunum stóð hann á odda fyri andstøðuni í Suðurkorea, sum tá hevði hernaðarstýri, og hann sat fleiri ferðir í fongsli og húsavarðhaldi. Í 1998 varð hann valdur til landsins forseta, og í 2000 tók hann stig til ein søguligan toppfund við Norðurkorea. Tað var hann Nobel-friðarheiðurslønina fyri seinni.



*Johansen hevur verið føroyskur sendimaður í London síðani 1. september í fjør*

in er, at írski mentamálaráðharrin skal til Føroya í september.

## Samferðsla og gransking

Umframt mál og mentan vilja írar eisini kunna seg um, hvussu føroyingar hava útbygt og skipað samferðslukervið. Áki Johansen sigur, at samanborið við fleiri lond eru vegirnir í Føroyum sera góðir, tunlarnir binda útjaðaran við miðstaðarøkið, og harafturat eru nógvar havnir kring landið, sum verða nógv brúktar.

- Herumframt er tað føroyska KT-sambandið gott, soleiðis at tey flestu hava ella kunnu hava breiðband, og soleiðis er tað als ikki í Írlandi, og hetta vilja írar eisini kunna seg um, sigur Áki Johansen.

Írar hava eisini áhuga í tættari sambandi millum írska gransking og føroyska gransking. Teir hugsa serliga um at fáa í lag samstarv millum Havstovuna og írskar granskarar, sum arbeiða við at granska ymisk viðurskifti í sjónum. Áki Johansen sigur, at uppgávurnar hjá teimum írsku granskarunum eru rættiliga líkar uppgávunum, sum Havstovan arbeiðir við, og tí vænta írar sær nógv burtur úr einum tílíkum samstarvi við føroyingar.

## Samhandil sparing

Áki Johansen tók við starvinum sum sendimaður í London fyri skjótt einum ári síðani, og hann er ikki í iva um, at føroyingar kunnu fáa gagn av virkseminum hjá sendistovuni har eins og hinum sendistovunum. Spurdur, um teir føroysku politikararnir kunnu fara eftir sendistovunum, nú teir skulu spara á fíggjarlógini, svarar sendimaðurin, at tað eru fleiri hættir at spara.

- Tað ber til at spara við at skerja eina játtan, og tað ber til at spara við at effektivisera. Men tað ber eisini til at spara við at sameina kreftir heima við kreftir uttanlands og á tann hátt fáa meiri burturúr, sigur Áki Johansen. Og hann er ikki í iva um, at vit eiga at hava eina sendistovu í London.

- Um vit hugsa um at fjøltátta okkara innflutning og útflutning, sleppa vit ikki uttan um Bretland.